


**Hevur tú eina søgu ella nøkur tíðindi til ÍtróttarSosialin, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tlf. 311820**

# Royndu styrkina uppi í Hovyík

*Um vikuskiftið skipaði Fragd og Fimi fyri kapping í styrkilyfting, har tey, sum dagliga venja í venjingarmiðstøðini, høvdu høvi at vísa sína styrki. Kappingin varð hildin í bilhøllini hjá Reyni Service, og varð tað Herman Hermansen, sum streyk avstað við sigrinum*

Jákup Mørk

Sum nevnt í leygardagsblaðnum, varð kapping í styrkilyfting fyriskipað í hølunum hjá Reyni Service leygardagin.

Kappingin nevndist Fragd og Fimi cup 2000, og umframt at vera eitt afturvendandi tiltak, varð kappingin á hesum sinni samstundis ein markering av 15 ára føðingardegnum hjá venjingarmiðstøðini í Djóna í Geils gøtu.

### Í mun til vektina

Tilsamans vóru tað seks mans, sum royndu seg henda dagin, men av teimum vóru tað bert tríggir, sum luttóku í samlaðu kappingini, har luttakararnir skuldu kappast í trimum greinum, Squat, Bench press og Dead lift.

Sjálvsagt er munur á støddini á ymsu luttakarunum, og tískil vóru lyftu vektirnar umroknaðar, soleiðis at stig vórðu givin, sum samsvaraðu við kropsvektina.

### Herman vann

Tá tað kom til stykkis, var besti luttakarin Herman M. Hermansen. Í øllum kappingargreinunum var hann tann av luttakarunum, sum fekk flestu stigini.

Hinir luttakararnir stóðu seg tó eisini sera væl, og ikki færri enn fýra persónlig met vórðu sett henda dagin. Føroysk met vóru tó eingi av, og hetta var kanska heldur ikki væntandi. Kappingin var nevnliga fyriskipað soleiðis, at eingin av teimum allarsterkastu vóru við, og helst er hetta eisini sunt fyrio aðrar íðkarar, sum ikki eru í heilt sama flokki sum Regin Vágadal og hansara líkar.

Lyftini hjá einstøku luttakarunum vóru hesi:

**Squat:**
Herman M. Hermansen, 150 kg.
Christian Djurhuus, 150 kg.
Jens Kristian N. Dam, 130 kg.

**Bench Press:**
Christian Djurhuus, 120 kg.
Herman M. Hermansen, 115 kg.
Jens Christian N. Dam, 95 kg.

**Dead lift:**
Christian Djurhuus, 212,5 kg.
Herman M. Hermansen, 200 kg.
Jens Christian N. Dam, 180 kg.

Samanlagt góvu ymsu lyftini hetta stigatal:
Herman M. Hermansen 361,305 stig
Christian Djurhuus 337,75 stig
Jens Christian N. Dam 325,62 stig


*Herman roynir seg her í Squat, har hann megnaði at lyfta 150 kg., sum eisini er personligt met hjá honum*
**Mynd: Jonhard Hammer**

# Bridge - FM kvinnupør

*Leygardagin varð FM kapping fyri kvinnupør hildin í bridgehúsinum í havn. Endaligir vinnarar av kappingini gjørdust Henriette Svenstrup og Jóna Grunnveit*

Arnbjørn Sivertsen

Leygardagin 3. februar var FM kappingin fyri kvinnupør í Bridgehúsinum í Havn. 9 kvinnupør hildu seg til hendan dagin, og fingu eina góða, spennandi og hugnaliga kapping saman, har Heðin Mouritsen, Oddmar Danielsen og undirritaði stóðu fyri tí praktiska, m.a. at skipa fyri barometri og einari meldikapping við yvirsitaraborðið.

Tey bæði fremstu pørini løgdu seg tíðliga á odda. Marjun Restorff og Arnleyg Mikkelsen høvdu leiðsluna meginpartin av kappingini, men á sjálvari málstrikuni eydnaðist Henriettu Svenstrup og Jónu Grunnveit at taka seg fram um og ogna sær FM meistaraheitið fyri kvinnur 1999-2000. Tær báðar hava ikki spælt so nógv saman áður, og má tað tí metast at vera eitt einastandandi gott úrslit.

Tillukku, tit báðar!

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Henriette Svenstrup - Jóna Grunnveit | 134 |
| 2 | Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen | 121 |
| 3 | Ásvør Djurhuus - Fríðhild Petersen | 117 |
| 4 | Ásla Weihe - Hallgerð Hansen | 103 |
| 5 | Jórun Højsted - Marita Krosstein | 98 |
| 6 | Gunna Midjord - Maria Christiansen | 79 |
| 7 | Súsanna Dam - Súsanna Martinsdóttir | 73 |
| 8 | Jórun Johannesen - Randi Jacobsen | 71 |
| 9 | Hervør Isaksen - Bibi Haraldsen | 68 |

Vit skulu síggja eitt av teimum nógvu góðu spølunum hendan dagin hjá teimum nýggju føroyameistarunum.

No 3
S/EV

| | | |
|---|---|---|
| | Q984<br>K7<br>KQ762<br>84 | |
| K1076<br>QJ1065<br>A4<br>KJ<br>AQ1075 | | A3<br>A843<br>83 |
| | J52<br>92<br>J1095<br>9632 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Jóna Grunnveit | Súsanna Dam | Henriette Svenstrup | Súsanna Martinsdóttir |
| | | | pass |
| 1hj | pass | 2ut* | pass |
| 3kl** | pass | 4ut*** | pass |
| 5rú**** | pass | 6hj | pass |
| pass | pass | | |

* Steens 2ut. Lovar trumfstuðul og styrki.
** Sterka hond, onga singleton.
*** Blackwood/Morrow. Spyr eftir essum.
**** Eitt ess av 5.

Tá Jóna við 14 hp meldar 3kl og lovaði eyka styrki, fór Henriette beina kós móti slemm
Tær báðar vóru tær einastu, ið meldaðu slemm við hesum kortunum, og tað gjørdi tí minni, at tær bara fingu 12 stikk, tá allar hinar fingu 13 stikk í 4hj.

Opin parakapping í Bridgehúsinum
FBS skipar fyri einari almennari parakapping leygardagin 19. februar í Bridgehúsinum í Havn. Byrjað verður klokkan 13.00, og tey, sum ætla at vera við, skulu bara møta á staðnum nakrar minuttir áðrenn kappingin byrjar. Tað verða nógvir og góðir vinningar at fáa í kappingini. Spæligjaldið, 50 kr. fyri hvønn, fer beinleiðis at stuðla landsliðnum, sum skal til Íslands í summar at kappast um Norðurlandameistaraheitið.



# 176 mál eru farin ígjøgnum

*Í 65 landsdystum hava føroyingar skorað 39 mál, og 39 ferðir eru føroyingarnir farnir av vøllinum uttan at hava skorað mál*

Hagtølini hjá landsliðnum eru batnaði tey seinnu árini, men enn er tað soleiðis, at mótstøðulondini skorað fleiri mál, hvørja ferð føroyska liðið skorar eitt mál.

Eftir 3–2 tapið ímóti Íslandi eru 176 mál farin ígjøgnum hjá føroysku málverjunum í 65 altjóða skrásettum landsdystum. Fýra ferðir hevur landsliðið tapt við sjey málum – í Rumenia og í Jugoslavia og á heimavølli ímóti Noregi og Jugoslavia. Men nú er tað langt síðani, at føroyska liðið tapti við fleiri enn tveimum máum.

Landsliðið spældi fyri fyrstu ferð í undankapping í 1990. Tey fyrstu árini plagdi liðformaðurin, Jóannes Jakobsen, at siga, at um tapini vóru minni enn 4–0, so var tað ikki so galið. Tað var heilt galið, tá Estland í 1998 vann 5–0, men burtursæð frá tí ferðini skulu vit aftur til 1996 fyri at finna tap við fleiri enn tveimum málum. Tað vil við øðrum orðum siga, at hagtølini í miðal fyri hvønn dyst eru betraði tey seinnu árini, sjálvt um tey framvegis ikki eru serliga góð.

Av teimum 176 málunum, sum eru farin ígjøgnum, eru 29 skorað í 17 vinardystum, 78 eru skorað í 28 EM undankappingardystum, og 69 eru skorað í 20 HM undankappingardystum.

Jens Martin Knudsen er í 49 landsdystum farin 137 ferðir í meskarnar eftir bóltinum. 24 mál eru í trettan dystum farin ígjøgnum hjá Jákupi Mikkelsen, og hjá Kaj Leo Johannesen fóru í fýra dystum níggju mál ígjøgnum. Bjarni Johansen vardi málið tvær ferðir, og tað fóru fimm mál ígjøgnum, og tá Sunvard Joensen mánadagin í síðstu viku spældi á landsliðnum fyri fyrstu ferð, fór eitt mál ígjøgnum.

### Skora aðru hvørja ferð

Í teimum 65 landsdystunum hevur tað eydnast føroyingum at fingið 39 mál. Tað vil við øðrum orðum siga, at í miðal hevur tað eydnast at fingið mál meiri enn aðru hvørja ferð.

Eitt eru miðal hagtøl og nakað annað er veruleikin. Hann er, at føroyingar eru 39 ferðir farnir av vøllinum uttan at hava skorað (tveir av dystunum eru endaðir við málleysum javnleiki). Í 26 dystum hava føroyingar fingið mál. Hægsta talið í einum dysti er trý mál. So mong vórðu skorað í báðum dystunum ímóti San Marino í 1995.

Tá Kurt Mørkøre skoraði ímóti Íslandi, hevði málturkurin verið í fýra heilar dystir. Einki føroyskt mál var skorað síðani Uni Arge eftir 47 minuttir legði Føroyar framum um 2–1 ímóti Bosnia á Svangaskarði. Tað var 9. juni í fjør.

Uni Arge skoraði bæði málini ta ferðina, og hann er einasti føroyski spælarin, sum hevur skorað tvey mál í einum dysti. Todi Jónsson hevur eina ferð skorað trý mál í einum dysti. Tað var í San Marino 11. oktober 1995.

Tey 39 føroysku landsliðsmálini eru býtt soleiðis uppá spælarar: Todi Jónsson (9), Uni Arge (5), Jan Allan Müller (4), Jens Kristian Hansen, Henning Jarnskor, Kurt Mørkøre, Torkil Nielsen, John Petersen, Jens Erik Rasmussen og Kári Reynheim (2), Jan Dam, Hans Fróði Hansen, Øssur Hansen, Óli Johannesen, Allan Mørkøre og Julian Johnsson (1), og í 1994 vóru grikkar so galantir, at teir gjørdu eitt sjálvmál á Svangaskarði.

JH


*Í meðal sleppa føroysku leikararnir at fegnast um málskjóting í meira enn øðrum hvørjum dysti*
**Mynd úr bókini, Fótbóltslandsliðið**

# Svumu í Gøtu

*Um vikuskiftið var stór svimjikapping í Gøtu, har 182 luttakarar úr trimum teimum yngstu aldursbólkunum luttóku*

Jákup Mørk

Teir 182 svimjararnir umboðaðu sjey ymisk svimjifeløg, sum komu úr øllum landinum.

### Skeggjar fekk flest heiðursmerki

Lagt varð til brots fríggjakvøldið, tá elstu luttakararnir royndu seg í teimum fýra svimjigreinunum, sum vanliga verður kappast í.

Leygarmorgunin fóru yngru luttakararnir í gongd, og síðani varð hildið fram, til allar kappingargreinarnar vóru avgreiddar.

Til samans var talan um 34 ymsar kappingargreinar, og tá avtornaði vórðu tað gøtufólkini, sum sótu eftir við flestu heiðursmerkjum.

Annars frætta vit frá fyrireikarunum, at kappingin var sera væl eydna. Nógvir áskoðarar vóru til staðar, tá kappast varð, og einki er at ivast í, at luttakararnir eisini stuttleikaðu sær, nú tey vóru savnað so at siga eitt heilt vikuskifti.

Sum omanfyrinevnt, so vórðu tað Skeggjar úr Gøtu, sum fingu flestu heiðursmerkini, men tað var nú ikki soleiðis, at gøtufólkini tóku alt til sín.

Øll feløgini fingu onkur merki við sær heim aftur, og varð samlaða býti soleiðis:

Skeggjar, 10 gull, 8 silvur og 7 bronsu
Havnar Svimjifelag, 10. gull, 7 silvur og 4 bronsu
Tvøroyrar Svimjifelag, 7 gull, 10 silvur og 6 bronsu
Ægir, 2 gull, 1 silvur og 6 bronsu
Flot, 2 gull og 4 bronsu
Fuglafjarðar Svimjifelag, 1 gull og 1 silvur
Vágs Svimjifelag, 3 silvur og 2 bronsu


*Ikki færri enn 182 luttakarar royndu seg í váta elementinum í Gøtu um vikuskiftið. Her síggja vit fýta teirra ´í eini stuttari fríløtu*
**Mynd: Jonhard Hammer**



# breyt hondina

*Í løtuni er ivasamt, um Leivur Holm verður at síggja aftur á kyndilsliðnum hetta kappingarárið*

Jákup Mørk

Sum kunnugt vann mansliðið hjá Kyndli steypafinaluna móti Neistanum leygardagin.

Sum vera man, so var lagið í kyndilsleguni gott eftir dystin, men kortini var gleðin nakað skerd hjá summum.

Leivur Holm varð nevnliga somikið óheppin, at hann breyt sær hondina tíðliga í dystinum.

At byrja við varð ikki hildið, at skaðin var serliga álvarsligur, men sunnudagin varð brotið staðfest, og vongspælarin noyðist nú at binda frið komandi fýra vikurnar.

Tá vit í gjár tosaðu við Kyndilsvenjaran, Sophus Dahl Christiansen, visti hann ikki at siga, um Leivur verður at síggja á liðnum, tað sum eftir er av hesum kappingarárinum.

Framman undan noyðist Kyndilsliðið eisini at vera vinstrahondsleikaran, Róar Nielsen, fyri uttan. Eisini orsakað av brotið í hondini.